# Norðoyastevna verður ikki blokerað

**Sambært formanninum í Klaksvíkar arbeiðsmannafelag, Kristoffur Olsen, hava arbeiðarafeløgini í Klaksvík ikki nakrar ætlanir um at blokera Norðoyastevnu**

NORÐOYASTEVNA
*Solby A. Eliasen*


*Arbeiðarafeløgini í Klaksvík hava reist spurningin um at fáa undantaksloyvi til norðoyastevnu millum øll arbeiðarafeløgini í verkfalli*

– Vit hava ongar ætlanir um at blokera Norðoyastevnu, sigur Kristoffur Olsen, formaður í Klaksvíkar arbeiðsmannafelag. Hann greiðir frá, at eftir at tað slitnaði partanna millum fyri aðru ferð, tá sótu feløgini og fundaðust eina løtu. Tá høvdu feløgini í Klaksvík tikið norðoyastevnu upp og tosa um møgulig undantaksloyvi.

– Vit tosaðu um tað, og vit spurdu tey, hvussu tey høvdu gjørt, um tað var Ólavssøka, greiðir Kristoffur frá. Hann sigur, at tey serliga hugsa um fýrverkaríið og tivoli, sum allarhelst kann fara at verða rakt harðast av verkfallinum, um onki sleppur norðureftir. Kristoffur sigur tó, at ongin avgerð er tikin um undantaksloyvi, men tey fara at taka málið uppaftur á fundi millum feløgini í dag ella í morgin.

– Hetta er sjálvandi eisini við tí fyrivarni, at vit vita slettis ikki, hvussu tað er við allari vøruni, um hon yvirhøvur er komin til landið, sigur Kristoffur, sum leggur dent á, at feløgini ikki fara at blokera norðoyastevnuna.

Hann sigur eisini, at arbeiðarafeløgini í Klaksvík bert hava fingið tann eina fyrispurningin um undantaksloyvi, og tað var frá sjálvum borgmeistaranum til at rudda býin á stevnuni.

– Og tað játtaðu vit teimum, og tað stendur við, sigur Kristoffur Olsen, sum heldur, at tað lat til, at hini feløgini í verkfalli væl skilja støðuna viðvíkjandi norðoyastevnu. Men hvat endaliga verður avgjørt í hesum málinum, fæst so ikki at vita, fyrr enn feløgini hava havt fund.

### Fyrireikingarnar ígongd

Meðan alt hetta stendur upp á, halda fyrireikingarnar til stevnuna fram sum vanligt, hóast alt tykist eitt sindur óvist. Og allastaðni har ein kemur í Klaksvík verður spurt um, tað fer at verða nøkur norðoyastevna. Nógv eru svartskygd, meðan onnur slettis ikki duga at síggja nakra orsøk til at útseta stevnuna.

Tosað hevur verið um at møguliga útseta stevnuna til vikuskiftið millum vestanstevnu og ólavssøku, men tað letur ikki til, at tað er undirtøka fyri tí kortini. Onkur hevur havt á máli, at øll tey tiltøk, sum møguliga ikki kunnu verða á norðoyastevnu orsakað av verkfallinum, kunnu útsetast til Klaksvíkar kommuna fyllir í august. Undir øllum umstøðum man tað ongantíð áður hava verið tosað so nógv um, um norðoyastevnan skal útsetast ella ikki.

Tað er tó ein sannroynd, at norðoyastevna er tað fíggjarliga grundarlagið hjá fleiri smærri feløgum, sum plaga at skipa fyri tiltøkum á norðoyastevnu. Og nógv meta, at tað ikki fara at koma so nógvir stevnugestir í ár sum undanfarin ár.

Á norðoyastevnu eru nógv føst tiltøk, sum eru ár eftir ár, til dømis tivoli og fýrverkarí, og tað er serliga tey føstu tiltøkini, sum krevja, at vøra kann koma norður, sum ger, at fólk tosa so nógv um, um norðoyastevnan fer at verða nakað verd í ár.

Men sum Sosialurin skilir, so er fýrverkið langt síðani komið til landið og liggur á heilsøluni í Klaksvík. Og frá NFÍ verður sagt, at flestu lutirnir til Tivoli somuleiðis eru komnir til landið, men spurningurin er, um tað fer at sleppa norður.

Men tað fara arbeiðarafeløgini sum sagt at taka støðu til í dag ella í morgin, so um tað verður játtað, so er ikki vist, at norðoyastevnan 2003 fer at verða so skerd, sum tað varð væntað.

Tað eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa nakra viðmerking frá forkvinnuni í Føroya arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, áðrenn evsta mark.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá góði pápi,
verpápi, abbi og langabbi okkara

**Poul Joensen**
av Trøllanesi

doyði og varð jarðaður.

Takk tit á Norðoya Røktarheimi,
sum vóru um hann til tað seinasta.
Takk øll tit sum ringdu, sendu blómur og gávu
til Mikladals kirkju.
Og tit mongu, sum fylgdu honum til gravar.
Takk tit sum hjálptu við jarðarferðina.
Prestur og kirkjutænarar.
Manningin á Barsskor og tit sum koyrdu.
Ein serlig tøkk til bygdarfólkið á Tørllanesi
og kallsoyingar annars.
Hjartans tøkk øll somul

**Marita, Eyðun, Jóngerð og Steinvør**

# 19 ára gamal játtað seg sekan

**Ein 19 ára gamal drongur hevur játtað seg sekan í herverkunum, sum vóru fyri stuttum. Talan er um nakrar brotnar rútar í Havnini**

HERVERK
*Ingrid Bjarnastein*

Fyri stuttum var ein røð av herverkum framd í Havnini. Vikuskiftið 26. og 27. apríl varð ein røð av herverkum framd í Havn, og vakthavandi á politistøðini segði tá, at tað kundi verið líkt til, at ein ella annar, sum var komin frá høllini á Nabb ella Norðurlandahúsinum hevði knúst rútar eftir eini leið.

Talan var um brotnar rútar, bæði á húsum og bilum, har viðkomandi hevði blakað grót ella urtapottar inn.

Í teimum einu húsunum kundi staðið rættiliga illa til, har ein urtapottur varð blakaður inn ígjøgnum ein sethúsarút. Urtapotturin, sum var stórur og tungur, lendi á høvdalagnum í einum kamari, har ein ung genta vanliga plagdi at sova.

Nú letur tó til, at løgreglan í Havn hevur fingið fatur á gerningsmanninum. Ein 19 ára gamal drongur hevur um vikuskiftið játtað seg sekan í herverkunum, upplýsir vakthavandi á politigarðinum í Havn.

Tað eydnaðist okkum tó ikki at fáa fatur á Bergleifi Brimvík, leiðara á kriminaldeildini, fyri at fáa at vita, hvussu nógv av hesum herverkunum ungi maðurin hevði framt.



# Herverk niðri á Kongabrúnni


*Bilarnir fingu eisini sítt. Gerningsmaðurin hevur havt til fragd at bróta til vinstru og høgru um vikuskiftið*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Um vikuskiftið hevur onkur havt til fragd at gera seg inn á bátar og bilar niðri á Kongabrúnni í Havn. Talan er um brotnar rútar, sum vórðu meldaðir til løgregluna sunnudagin. Politiið veit ikki enn, hvør hevur framt herverkini.

Tó verður væl latið at vikuskiftinum. Bæði í Havn, Klaksvík og í Suðuroy hevur verið friðarligt.

Politiið hevur ikki havt nógv at gera, og fólk hava skikkað sær stak væl.


*Um vikuskiftið hevði onkur gjørt seg inn á bátar á Kongabrúnni í Havn*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Stórt norðoyastevnublað í morgin



*Sosialurin gevur í morgin út stórt norðoyastevnublað*

**Í sambandi við norðoyastevnuna, sum verður um vikuskiftið, hevur Sosialurin gjørt eitt stórt serblað við tilfari rundanum stevnuna**

SERBLAÐ
*Ingrid Bjarnastein*

Norðoyastevnan er í hondum, og í hesum sambandi hevur Sosialurin gjørt eitt stórt serblað. Serblaðið, sum telur 36 síður, hevur tilfar rundan um stevnuna, og sjálvandi er norðoyastevnuskráin eisini við.

Vit hava millum annað tosað við børnini í útibarnagarðinum Fjallafípuni, Aleksander Djordjevic, vitjað nýggja matstovu á Viðareiði og sjálvandi er eisini kappróðrar og fótbóltstilfar við í blaðnum. Harafturat er nógv annað spennandi tilfar.

Sosialurin, við eyka norðoyastevnublaðnum, verður borin út í hvørt hús í Norðoyggjum.




Undir heitinum I-Net Breiðband bjóðar Føroya Tele
nú enn skjótari internet samband til privata brúkaran.
Ferðin við I-Net Breiðbandi er upp í 10 ferðir skjótari
samanborið við eitt vanligt 56k modem.

Við I-Net Breiðbandi fært tú fast samband við internetið.
Tú ert on-line alla tíðina - við føstum mánaðargjaldi og
uttan mun til, hvussu nógv tú heintar niður av internetinum.

Stovningargjaldið fevnir ikki um beinara og uppseting.

**Breiðband Privat**
Downstream upp í 512 Kbit/sek
Upstream upp í 128 Kbit/sek

**Kostnaðar**
Stovningargjald kr. 1.195,-
Mánaðargjald kr. 649,-